Dimmalætting

– ÁLÍTANDI TÍÐINDI

»ítróttur«

Nr. 69 • 120. árgangur • 15. apríl 1997 • Tlf. 11212 • Fax 10941

7 kr.

Politistalið næstan tikið av skriðulopi undir bjargingararbeiði

Undir leitingararbeiðnum í Kunoynni leygarmorgunin mundi endað heilt galið, tá grót loysnaði úr hamrinum omanfyri løgverjumennirnar. Bert um ein metur var millum mennirnar og stóru klettarnar, sum struku framvið monnunum við nógvari ferð.

ELI GUTTESEN

Í stóra leitingartiltakinum í Kunoynni leygarmorgunin kundi enda heilt galið. Beint sum eitt lið av løgverjumonnum nærkaðist staðnum, har tyrlan hevði funnið likið av tí 44 ára gamla Anrias S. Jacobsen, loysnaði grót og størri klettar úr hamrinum omanfyri mennirnar. Nærmastu klettarnir bóltaðu bert hálvan annan metur frá monnunum og kundu tað sama rakt mennirnar. Løgreglumennirnir voru tá tætt niðanfyri tí staðnum, har tyrlan hevði funnið likið av manninum.

Triggar løgverjumenn við hundum voru komnir úr Havn at hjálpa til í leitingararbeiðinum. Tá mennirnir nærkaðust staðnum, har tyrlan sagði seg hava sæð likið, kom orogv á politihundarnar. Tá vistu løgreglumennirnir, at teir voru á rættari leið og likið varð funnið stutt eftir liggjandi á einum hamri.

– Sannleikin er, at tað var við at enda heilt galið, sigur syslumaðurin í Norðoyggum, Karsten Hansen.

– Vit vóru einir seks mans beint undir staðnum har sum maðurin lá, tá eitt lop kom oman úr erva. Tann eini av hundamonnunum var farin upp á hamarin fyri at síða likið niður. Men hesin var ikki orsøkin til lopið, tað byrjaði longur uppi. Stórir klettar um eini trý-fýra hundrað pund struku framvið okkum, har vit stóðu. Nærmastu klettarnir voru bert um hálvan annan metur frá okkum. Kom nakað á okkum, høvdu vit allir farið omanav og uttan iva latið liv, sigur Karsten Hansen, sum sjálvur var ein av monnunum í leitingarliðnum.

Heimatiðindi, síða 4

Mynd: Kalmar



Undirgrundin er tykkara!

Í sambandi við landsfund Sambandsfloksins um vikuskiftið hevur formaðurin í danska Vinstraflokkinum, Uffe Ellemann-Jensen, verið í Føroyum. Hann var gestaræðari á landsfundi floksins og helt fyrilestur í læraraskúlahøllini um smátjóðir. Hann sagði seg vera ógvuliga kløkkan av av tíðindunum í Føroyum, hvørt undirgrundin er yvirtikin, ella tað bara er umsitingin, vit hava fingið. Bæði í læraraskúlahøllini og á landsfundinum legði hann dent á, at føroyingar hava ræðisrættindini. »Føroyingar raða fyri, um borað verður ella ikki, og tað verða tit, ið koma at »scora kassan«. At tað eru danir, ið samráðast við bretar um markið, er tí, at uttanríkismál eru undir felagsumsitingini,« sagði hann.

Lesið meira á síðu 9

Føroyingar útihýsa norðmonnum

Eru føroyingar framvegis ikki hugaðir at gera eina skilagóða fiskiveiðuavtalu um svartkjaftin við norskar myndugleikar, so er spurningurin um nøkur avtala verður gjørd í ár. Neyðugt er at henda avtalan verður gjørd innan 1. mei.

SNORRI BREND

Føroyar hava enn onga fiskiveiðuavtalu við Noreg. Hetta kann føra við sær, at eingin norsk svartkjaftaveiða verður í føroyskum sjóøki í ár.

Norskir fiskimenn eru kortini ikki hugaðir at gera eina ringa avtalu við føroyingar í hesum máli, bert tí at svartkjaftafiskiskapurin í føroyskum sjóøki í ár skal bjargast.

Hava takið á norðmonnum

Tey seinnu árini hava norsk skip havt góðan fiskiskap eftir svartkjafti undir Føroyum. Henda veiða fer fram frá seinnapartinum av apríl til miðskeiðis í mei mánaði. Tí er neyðugt hjá teimum at fáa eina avtalu í lag áðrenn hesin mánaðurin er úti. Í fjør var kvotan upp á 27.000 tons.

Paul Gustav Remøy sum er deildarleiðari í Fiskebåtredernes Forbund sigur við norska blaðið »Fiskaren«:

– Júst nú hava føroyingar eitt ávist tak á okkum. Men eg má leggja dent á, at føroyska fiskivinnan fer at fáa alstóran tørv á at koma inn í norskt sjóøki at veiða tosk, upsa og makrel.

– Tí tykir mær, at føroysku myndugleikarnir spæla høgt spæl í løtuni.

Paul Gustav Remøy sigur, at avtalurnar millum londini bæði eisini fevna um føroyskan toskafiskiskap í Barentshavinum, og um makrelrættindi hjá báðum partum.

Norskir fiskimenn halda lítið um at føroyskir myndugleikar bruka ein óavklaraða støðu viðvikjandi svartkjaftinum til at trýsta á norskar myndugleikar.

Sagt verður, at tað er ein afturvendandi hending, at Noreg hevur trupulleikar at fáa fiskiveiðuavtalurnar í lag við føroyingar, hóast talan ikki er um tær stóru nøgdirnar.

Undir fyrra samráðingarumfarinum undan jólum fóru føroyingar fra samráðingarborðinum, tí ein ikki var nøgdur við toskakvotuna í norskum sjógvi, sum í fjør var 2.900 tons. Føroyingar ynsktu hesa økta til 3.700 tons, meðan norðmenn bert ynsktu at leggja nøkur fá 100 tons aftrat hesi.

Minka kvotuna á makreli

Sambært Fiskaren, so standa føroyingar fast við at minka um kvotuna av makrel- veiðuna í føroyskum sjógvi.

Í fjør kundu norsk skip veiða 10.200 tons, meðan føroyingar nu vilja hava kvotuna minkaða niður í umleið 4.000 tons, sum er á leið tað sama sum føroyingar eiga í norskum sjóøki.

Men Paul Gustan Remøy er ikki sinnaður fyri at norskir myndugleikar byrja at slaka í makrelspurninginum. Hann heldur, at um so verður, fer Noreg at standa sum tapari í hesum striðnum.

Ætlanin er at nevndin í Fiskebåtredernes Forbund skal hava fund í dag, har altmalið um svartkjaftaveiðuna verður á skránni.

Í BLAÐNUM Í DAG

Eilif Samuelsen, landsstýrismaður við skúlamálum Mynd: Kalmar

Skúlabørn skulu læra at skapa arbeiði

Landsstýrismaðurin við skúlamálum, Eilif Samuelsen, er av tí áskoðan, at vit í Føroyum skulu hava meira entreprenørskap í skúlan. – Tey ungu skulu ikki bara hugsa um at fáa eitt arbeiðsplass, ið onnur hava skapað, men um at skapa sítt egna arbeiðsplass, sigur landsstýrismaðurin.

Heimatiðindi, síða 4

Sparikassin hevði metyvirskot í 1996

Føroya Sparikassi hevði aðalfund friggjadagin, har roknskapurin varð framlagdur og goðkendur. Og tað sær út til, at peningastovnarnir hava góðar dagar. Urslitið aðrenn skatt gjørdist 67,3 milliónir krónur. Hetta er 4,4 milliónir hægri enn metarið, sum var 1995.

Heimatiðindi, síða 6

At liva – tað er lívið

Leikbólkurin Grima framførir í hesum døgum ein sterkan leik um triggjar kvinnur á eini krabbameinsdeild. Leikurin verður ummældur í blaðnum.

Ummæli, síða 4

Teir triggir B36'ararnir Jákup í Stórustovu, Kristian á Neystabø og Hans J. Egholm kunnu fegnast um lutakastið til Intertoto Cup (Navnamynd)

B36 gott lutakast í Intertoto Cup

Um vikuskiftið var kastað lut um bólkarnar í stóru summarkappingini hjá UEFA, Intertoto Cup. Í ár er tað B36, sum umboðar Føroyar í hesi kapping, og sigast má, at teir í árstalsfelagnum kunnu vera væl nøgdir við lutakastið. B36 skal hitta eitt belgiskt, eitt norskt, eitt russiskt og eitt grikskt lið.

Ítróttur

Hepnir Lotto-vinnarar

Fleiri enn 4.000 føroyingar vunnu hjá Tipstænastuni um vikuskiftið. Tveir vunnu eykavinning upp á 425.000 krónur hvør.

EMIL L. JACOBSEN

Sum øll ivaleyst vita, hevði danska Tipstænastan útlovað tveir eykavinningar upp á ikki færri enn 425.000 krónur hvør, sum skuldu trekkjast millum føroysku Lotto-seðlarnar.

Í tíðindaskrivi sigur Tipstænastan, at teir báðir Lotto-seðlarnir, ið vóru trektir til eykavinningarnar, báðir vóru seðlar, sum vunnu 5. vinning – t.e. 33 krónur.

Teir báðir hepnu vinnararnir hevdu seðil nummar 9574-33370903 og 9575-03734582.

Teir kunnu venda sær til eitt av støðunum, har Lotto-seðlar verða seldir, ella beinleiðis til Tipstænastuna.

Trettan røtt

Annars vórðu funnir umleið 4.000 føroyskir vinnarar hjá Tipstænastuni fyrsta vikuskiftið, hon var í Føroyum.

Ein, sum spældi við í fótboltsveddingini, var enntá so beinrakin at fáa 13 røtt, og hann vinnur 21.409 krónur.

Í Lotto hevði eingin – heldur ikki í Danmark ella Grønlandi – sjey rætt, og tí verður vinningurin standandi til komandi leygardag.

Vinningurin til sjey rætt verður tá umleið tíggju milliónir krónur.

Vit prenta visittkort brævørk brævbjálvar skjótt og væl



Dimmalætting

Tlf. 11212 • Fax 17681

Tórshavnar Trafikkskúli

Suðuroyingar!

Um undirtøka er, verður undirvist í koyrikorti til:

Lastbil
Buss
Trailara

Byrjað verður týskvøldið 15. apríl, kl.20.00

Gjøllari upplýsingar á:

Tlf. 18821 · 15298 fartlf. 88777

Hotel Føroyar

Tlf. 17500

Hotellið við útsýninum

Svínakotelett

Orientale við risi og karrysós

kr. 98.-

ikki galdandi friggjadag og leygardag



«Kinkur er komin á góða samstarvið millum Føroyar og Danmark. Tað er uppgáva hjá tveimum samrikisflokkum sum Vinstra og Sambandsflokkinum at bøta aftur viðurskiftini»



«Føroyabanka-málið er eitt hitt álvarsamasta málið, ið høttir rikisfelagsskapin í løtuni. Vinstri stuðlaði meirluta løgtingsins um at fáa eina domarakanning. Við hjálp frá teimum Konservativu skákaði Nyrup- stjórnin sær undan. Nú mugu vit vóna at kanningarnevndin fær sum best burturur»



«Sum í Danmark eru tíðindafólk í Føroyum smittað av farsóttini 'notatisis'. Sjúkueyðkennini eru ein trábeitt leitan eftir loyniligum skjølum at nýta sum bót til tær hersknastu krásasupanir at borðreiða fyri almenninginum»

«Tit valda undirgrundini. Og eg vóni fyri tykkara skyld, at olja er í henni. Men varið tykkum fyri teimum stóru iløgunum í bara oljuvinnuna. Eitt eintáttað vinnuliv er altíð vandamikið. Tað ræður um at halda liv í øðrum vinnutáttum eisini»

Uffe tók øll á bóli

Orð: Pól á Kletti
Myndir: Kalmar Lindenskov

Uffe Ellemann-Jensen, formaður í Vinstra, heldur fyrilestur í Læraraskúlahøllini um smátjóðir. Hann segði seg vera skakkan av at hoyra umrøðuna í Føroyum, hvørt føroyingar valda undirgrundini ella bara hava fyrisitingina. «Tað er eingin ivi um, at føroyingar hava ræðisrættin og gera av um tað verður borað ella ikki. Og tað vera føroyingar, ið koma at 'skúma róman', um nøkur olja er,» segði hann

– Sum ráðharri við uttanríkismálum veit eg hvat hendi, tá avtala á heysti 1992 varð gjørd millum landsstýrið og ríkisstjórnina um undirgrundina. Har er eingin ivi: Tit føroyingar valda og fáa eisini ágóðan, segði Uffe Ellemann-Jesen í fyrilestri í Læraraskúlahøllini um smátjóðir. Orðini eru eitt svar til illgitingarnar í seinastuni um at danir í avtaluni hava tryggjað sær alt ræði á undirgrundini og at bara sjálv fyrisitingin er føroysk

Uffe Ellemann-Jensen er formaður í danska Vinstraflokkinum. Hann var í Føroyum í sambandi við landsfund Sambandsfloksins, har hann var gestarøðari leygardagin. Tað var kvøldið fyri, at hann helt nevnda fyrilestur í Læraraskúlahøllini.

Uffe Ellemann-Jensen sigur, at Vinstri í meira enn 90 ár hevur havt eitt sera gagnligt samstarv við liberala broðurflokkin í Føroyum, Sambandsflokkin. Og dagliga nýtir Vinstri gagn av at hava Jóhs. M. Olsen í tingbólkinum sum fólkatingsmann fyri Føroyar, valdan av Sambandsflokkinum. Tað hevur við sær, at ein fær innlit í og vitan um føroysk viðurskifti.

– Hesum hava vit brúk fyri. Vit siggja ringu fylgjurnar av, at ein stjórn vantar grundleggjandi innlit í viðurskifti hjá hinum meira fjaru ríkisportunum – í hesum føri Føroyar. Tað er tíverri ein sannroynd, at sitandi stjórn í Danmark ikki hevur nog góða hylling á føroyskum viðurskiftum. Stjórnini fattast tí eisini neyðugu virðingina fyri føroyska fólkinum. Tað er Føroyabanka-málið eitt talandi dømi um. Og tað er ikki at gera ov nógv av, at vit í hesum máli hava ein av størstu og álvarsamastu meinbogunum í samstarvinum millum Føroyar og Danmark. Í Vinstra hava vit framvegis ta støðu, at málið hevur fingið skeiva og órættvísa viðgerð. Tann nevnd, sum hevur fingið litið upp í hendur at kanna málið, er enn ikki liðug, men fer væntandi í summar at leggja álit út hondum. Tá kemur gongd aftur á orðaskiftið. Men so mangar upplysingar eru komnar undan kavi í hesum máli, at her er einki at ivast í, at ein djuptøkin kanning er neyðug, sigur Uffe Ellemann- Jensen.

Hann minnir á, at Vinstri stuðlaði á sinni meirluta løgtingsins í at fáa eina meira bindandi domarakanning setta í verk. Ein slík kanning er meira neyv, men Nyrup-stjórnin valdi við Konservativa Fólkaflokkinum sum skorðu – at ganga sína egnu leið. Nú má ein so vóna, at frágreiðingin frá kanningarnevndini gevur nøktandi upplýsingar.

– Hetta málið órógvar tað góða samstarv, ið annars hevur verið millum Føroyar og Danmark. Og vit sum hámeta virðið í ríkisfelagsskapinum, kunnu ikki lata okkum slíkt lynda. Hereftir verður neyðugt at tala meira opið um tann kink, sum er ískomin av hesum og royna at fáa hann burtur, so samstarvið millum ríkispartarnar kann halda fram ótarnað, sigur Uffe Ellemann-Jensen.

Tit ráða undirgrundini!

Eisini tær mýtur, ið stundum stinga seg upp um ríkisfelagsskapin, er neyðugt at jarðleggja aðrenn tær fáa høvi til at gera nakran størri skaða. Og Uffe Ellemann- Jensen minnir á, at her hava Vinstri og Sambandsflokkurin sum samrikisflokkar eina stóra felags uppgávu at greiða.

– Á ferð mínari í Føroyum havi eg argað føroysk tíðindafólk við, at tey eru smittað av somu farsótt sum tey donsku – av *notatisis*. Sjúkueyðkennini eru ein trábeitt leitan eftir loyniligum skjølum at nýta sum bót til ta hersknastu krásasupan at borðreiða fyri almenningin. Og nú er so talan um nøkur loynisskjøl, ið snúgva seg um yvirvaldsrættin til føroysku undirgrundina og tey ræevni, sum møguliga eru í henni. Har kann eg alt fyri eitt beina av vegnum allar illgitingar, sum í seinastuni hava stungið seg upp: Sum uttanríkisráðharri í Schluter-stjórnini, sum á heysti 1992 gørdi avtalu við landsstýrið um undirgrundina, sat eg sjálvur øðrumegin samráðingarborðið og veit tí hvat har fór fram. Tað eru **bara** føroyingar, ið raða yvir teirri olju, sum kanska er í undirgrundini. Tað er sjálvandi Danmark, sum tingast við bretar um, *hvat* er føroyskundirgrund, tí hetta er uttanríkismál, ið liggur undir felagsumsitingini.

– Men tá ið ein so er komin ásamt um, hvat er føroyskt øki og hvat er bretskt, er heilt greitt, at tað eru føroyingar, sum gera av, hvat skal henda. Og tað eru føroyingar, sum fáa vinningin av teirri olju, sum møguliga er í undirgrundini. Men inntøkur frá oljuni koma so í framtíðini at hava við sær krøv frá dønum um, at blokksteðulin skal minka og kanska falla burtur, segði Uffe Ellemann-Jensen.

Vandi í hvørjari vælferð

Uffe segði seg vóna, at olja er í føroysku undirgrundini, men ávaraði móti einum eintáttaðum vinnulivi, ið kollrennir alt annað.

– Tit fáa størri figgarligt frælsi og fara at fóta tykkum betur buskaparliga. Men oljan loysir ikki allar trupulleikar. Við fiskivinnuni hava tit higartil havt ein einstáttaðan búskap. Tá alt gekk upp á stás, rendi hon alt annað um koll, tí einki annað kundi kappast við lønsemi har. Men tá ið fiskiskapurin sveik, kom alt samfelagið í kreppu. Hetta sama kann eisini henda við oljuvinnuni, um hon einsamøll ræður øllum vinnulivinum. Tí er neyðugt at hugsa seg væl um og royna at fáa fleiri vinnur at fóta sær, sigur Uffe Ellemann-Jensen.

Hann segði, at bæði í Noregi og í Hollandi hevur ein merkt ferilin av hesum, at fyritøkur, ið annars góvu nógv av sær, heilt duttu niðurfyri tí at ein nú gjørdi ovurhonds iløgur í olju- og gassidnaðin.

– Men samstundis er greitt, at lukkast tað at fáa spjatt virksemið til stórar partar av samfelagnum og mangar partar av vinnulivinum, kann ein tálma hesum vandanum. Og tí haldi eg mannagongdina vera ógvuliga positiva, um *hvussu* ein í Føroyum er farin undir at fyrireika samfelagið at taka lut í útvinningini av olju.

– Tað er eingin ivi um, at føroyskur búskapur blómar, um olja fæst úr undirgrundini. Tær nýggju keldur, funnar eru bretsku megin markið móti Føroyum, kundu bent á, at somu møguleikar eru í føroyskum øki. Men vert er at hugsa um, hvussu stórar iløgur eru neyðugar, áðrenn oljan kastar nakrar bruksmøguleikar av sær, sigur Uffe Ellemann-Jensen.